# Fiskimaðurin bløðir fyri, at v

**Torleif Sigurðsson, reiðari, er ikki samdur við tingmenn í sínum egna flokki, sum eru fyri at áseta eina tilfeingisrentu sum almant avgjald fyri fiskidagar. – Vit skulu ansa ógvuliga væl eftir, at alt ikki endar í einum ellibita – og í ringasta føri í einum ruðulleika, sigur hann**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Skulu reiðaríir gjalda eina tilfeingisrentu, sum tilsamans er einar 350.000 miljónir krónur um árið, sum frammi hevur verið, kann tað skjótt gerast ein ruðuleiki fyri føroyska fiskiskipavinnu. Tað er ikki rætt at avvísa øllum nýggjum hugskotum, men í hesum førinum vil eg staðiliga mæla til, at málið um eina tilfeingisrentu verður bæði væl og virðiliga umhugsað, um tað yvirhøvur skal líkjast nøkrum.

Hetta sigur Torleif Sigurðsson, reiðari, sum eisini er býráðslimur í Klaksvík fyri Javnaðarflokkin.

- Hugskotið um eina tilfeingisrentu er sum aðrir bóltar, ið tveittir verða upp í loft. Summir bresta har uppi; aðrir koma niðuraftur og verða til okkurt – gott ella minni gott.

### ”Reyð” tøl

Torleif vísir á, at tað altíð fer at ganga upp og niður í fiskivinnuni, og tá ið tað gongur ímóti, fara nógv skip at hava ”reyð” tøl á niðastu linju, sum hann tekur til.

- Tí ivist eg stórliga í, um



eitt tilfeingisgjald verður gagnligt fyri fiskiflotan. Tað verður tað í hvussu er ikki, um hetta viðvirkar til, at ein partur av flotanum fer av knóranum.

Reiðarin vísir á, at tíðin krevur, at vit hava barnagarðar, skúlar, stovnar til eldri og sjúk – og vit skulu eisini hava mentan og sosial tiltøk av ymiskum slagi.

- Men vinnan má so avgjørt ikki vera nakað, sum man bara skal av við, tí tá verður ikki væl vorðið við øllum tí, sum samfelagið krevur, sigur Torleif Sigurðsson.

### Keyptir fiskidagar

- Tað eru fá skip, sum kunnu liva við teimum fiskidøgum, sum fiskidagaskipanin tilutar. Tí noyðast reiðaríir at keypa sær fiskidagar – ella skip - fyri nógvan pening fyri at fáa eyka fiskidagar. Hetta eru tískil ikki dagar, sum reiðaríir hava fingið frá landinum fyri einki. Hvussu verður við hesum døgum, um myndugleikarnir fara at krevja eina tilfeingisrentu – og verða hesir dagar tá tiknir aftur? spyr reiðarin.

*- Eg haldi, at tíðindini í fjølmiðlunum um útflutningin av feskum óvirkaðum fiski eru ov einvís, sigur Torleif Sigurðsson, reiðari*

Torleif vísir á, at síðan fiskidagaskipanin varð dagførd seinast, er ikki loyvt longur at selja og keypa dagar millum ymisku skipabólkarnar.

- Tí noyðast vit, sum hava línuskip og hava brúk fyri eyka fiskidøgum, at keypa dagarnar frá øðrum línubátum, sigur hann.

Reiðarin vísir á, at fiskidagaskipanin hevur verið ein ”jungla”, og tí er neyðugt, at slíkar prinsipiellar broytingar, sum ein møgulig tilfeingisrenta er, mugu umhugsast ógvuliga væl.

- Vit sleppa ongantíð undan tillagingum og hugburðsbroytingum, men endamálið við broytingum má vera, at tær eru til tað betra fyri samfelagið.

### Óvirkaður fiskur

Torleif Sigurðsson vísir á ta øsing, sum hann rópar tað, ið hevur verið um útflutning av feskum óvirkaðum fiski.

- Eg haldi, at hesi tíðindi hava verið í so einvís og hava fingið ov nógv pláss í fjølmiðlunum. Tað, sum sagt hevur verið, hevur tískil av mongum verið hildið at verið einasti sannleikin. Men tað haldi eg er ein rong mynd av veruleikanum.

Reiðarin vísir á, at so gott



---

# Fugltúgvan til sølu á einum pela á Eið

**Tað er ivaleyst heldur sjáldamt at síggja eitt skip til sølu á einum pela, men hetta hava so Eiðis kommuna og Arbeiðsmannafelagið á Eiði, sum eiga skipið, valt at gera**

SKIPASØLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgun ringdi ein lesari til Sosialin, sum visti at siga, at línuskipið, Fugltúgvan, sum P/F Torvanes á Eiði eigur, er lýst til sølu.

Plaseringin av hesi lýsing er heldur øðrvísi enn aðrar lýsingar av slíkum slagi.

- Skipið er nevniliga lýst til sølu á einum pela á Vaglinum á Eiði, tey rópa.

Lesarin, sum hevur síni áhugamál í fiskivinnuni, visti at siga, at skipið ikki er lýst til sølu aðrastaðni.

- Eg havi kannað hetta, og skipið er í aðrar mátar ikki lýst, sigur hann.

Tað eru Eiðis kommuna og Arbeiðsmannafelagið á Eiði, sum eiga hvør síni 50% í felagnum, sum eigur skipið

- Eg haldi tað vera undarligt, at Eiðis kommuna og Arbeiðsmannafelagið lýsa eitt skip, sum helst er vert einar 12 miljónir krónur, til sølu á einum pela – og bara á einum pela. Tí helt eg, at almenningurin eigur at fáa høvi at frætta um ætlaðu søluna, sigur hann.

Tað hevur annars gingið rímiliga væl hjá Fugltúgvuni, sum við sínum 18 árum á baki telist millum nýggjaru línuskipini í flotanum.

Skipið hevur ligið í ovara enda millum onnur línuskip í fleiri ár.

Sosialurin ringdi um middagsleitið í dag til Dánjal Jákup Vilhelm, útgerðarmann, fyri at fáa hann at siga okkum, hví felagið hevur valt at lýsa Fugltúgvuna til sølu á henda hátt, men Dánjal Jákup hevur onga viðmerking til málið.

Hann váttar tó, at skipið er lýst til sølu á einum pela, sum keldan hjá okkum sigur.

Fugltúgvan er bygd í Strandby í Danmark í 1988

